## Christian Høgni á talvuna

AB legði flúgvandi frá landi, tá ið Christian Høgni Jacobsen og teir vunnu 4-0 í Kolding. Tað vignaðist ógvuliga væl hjá Christian Høgna Jacobsen og AB, sum í dag vóru á útivølli ímóti Kolding FC. AB vann 4-0 eftir hálvleiksstøðuna 1-0. Í venjingardystunum hevur tað gingið striltið hjá Christian Høgna Jacobsen at finna vegin til meskarnar, men í dag glapp tað. Christian Høgni Jacobsen skoraði til 3-0, tá ið tað restaðu tólv minuttir.



## Eingin tekur Val

Randi Wardum og liðfelagarnir úr Vali eru einaráðandi í íslendskum fótbólti í løtuni. Fríggjadagin snøgt sagt hølvaðu tær Afturelding av við heili 8-0. Randi Wardum vardi málið allan dystin, og talan má helst verða um ein av hennara friðarligastu dystum. Støðan í hálvleikinum var 2-0. Valur hevur framvegis fult stigatal, 39 stig eftir 13 dystum. Í morgin er aftur landskappingardystur á skránni, tá Keflavík, sum liggur á áttanda plássi, vitjar hjá Vali.

B36 – HB 2-0 (2-0):

# B36 eigur Havnina

*B36*

*HB*

**HB fann ongantíð góða spælið fram, og tað vóru trý uppiborin stig, sum B36 fekk við at vinna 2-0 á HB sunnudagin**

FÓTBÓLTUR
*Pætur Albinus*
*patur@sosialurin.fo*



*Hanus Thorleifsson staðfestir her uppibornan sigurin hjá B36 á grannunum úr HB*

*Mynd: Ólavur Fredriksen*

Grannauppgerð var í Gundadali í gjár, tá ið B36 tók ímóti grannunum úr HB. B36 kom væl frá summarsteðginum eftir sigur á Sandi, meðan HB hevði nakað at prógva, eftir at teir bara fingu javnleik heima ímóti Víkingi mikukvøldið.

Bæði liðini vóru nakað skerd til dystin. HB var uttan Fróða Benjaminsen og Kára Nielsen, meðan B36 var Súna Olsen og Herbert í Lon Jacobsen fyri uttan.

### Høg leikferð

Tað regnaði illa í Gundadali í gjár, og hetta gjørdi, at bólturin ferðaðist sera skjótt á graslíkinum. HB kom betur frá byrjan, og royndi seg við nøkrum uppspølum í høgru síðu, sum tó ikki kastaðu nakað serligt av sær.

B36 vann seg spakuliga inn aftur í dystin, og gjørdi seg skjótt til spælstýrandi liðið. Uttan at nakar stórvegis málmøguleiki hevði verið, fekk B36 tillutað brotsspark í 26. minutti, tá ið dómarin metti, at Vagnur Mohr Mortensen hevði havt hondina á bóltinum. Hetta brotssparkið setti liðskiparin, Klæmint Matras, í netið, og so var B36 á odda 1-0.

B36 vildi hava meir. Stutt eftir málið var enski Sam Malsom í tveimum atløgum tætt við at økja, men í mál fór bólturin ikki.

B36 fekk tó eitt mál afturat áðrenn hálvleikssteðgin. HB-verjan var heldur afturhaldandi, tá ið Hanus Thorleifsson slapp at renna fríur í høgru síðu. Hann rak ímóti málinum, ivaðist eitt sindur, men skeyt síðan bóltin í mál til 2-0.

2-0 til B36 var eisini hálvleiksstøðan, og sæð yvir fyrra hálvleik, so var tað eisini B36, sum hevði mesta spælið og flestu málmøguleikarnar.



*Jákup á Borg frøist um sigurin á fyrrverandi liðfeløgunum úr HB*

*Mynd: Ólavur Fredriksen*

### Nógvir málmøguleikar

Seinni hálvleikur var áhugaverdur at síggja frá áskoðaraplássunum. Dysturin lat upp fyri øllum, og málmøguleikarnir vóru nógvir. Seinni hálvleikur byrjaði við einum langskoti frá Páll M. Joensen hjá HB, og løtu seinni var tað í hinum endanum, at 'nýggi' B36-arin, Jákup á Borg, royndi seg.

Eina løtu í seinna hálvleiki fekk HB nógv pláss, og teir høvdu nógv spæl. Tað var eisini um reppið, at Milan Kuljic minkaði um munin, tá ið hann eftir gott uppspæl slapp at standa púra leysur í brotsteiginum. Meinhard Joensen í B36-málinum bjargaði tó meistarliga.

HB-spælið fánaði tó burt, og B36 slapp aftur at stýra dystinum. Teir vóru nakað bólttryggari enn HB, og hildu bóltin leingi ímillum sínar egnu. Málmøguleikar manglaðu ikki, men hin størsta mundi Sam Malsom eiga, tá ið hann í 79. minutti slapp púra leysur. Skotið hjá honum var tó ikki gott nokk, og Marcin Dawid í HB-málinum bjargaði.

HB sá ikki út til at hava hugflog, orku ella viljan til at koma aftur í dystin, og dysturin endaði 2-0 til B36. Samanumtikið eitt uppiborið úrslit, sum førir við sær, at B36 nú er einsamalt á 2. plássi, meðan HB nú er fýra stig aftanfyri B36 og heili 12 aftanfyri oddaliðið, EB/Streym.

## Greiða uppgávuna væl

Venjarin hjá B36, Heðin Askham, var væl nøgdur við avrikið hjá leikarum sínum eftir dystin.

- Vit greiða uppgávuna væl. Vit byrja varliga og koma betur við í dystin. Vit blíva spælstýrandi, og fáa tvey mál, segði Heðin Askham, sum ikki kallar seinna hálvleik so áhugaverdan, við tað at leiðslan skuldi verjast.

Hann var fegin um at hava Jákup á Borg aftur í hópinum.

- Jákup hevur gjørt tað gott í vikuni, og hann vísti í dag, at hann er væl fyri, segði venjarin eftir dystin.

Komandi sunnudag spælir B36 á Toftum ímóti B68, og Heðin er ikki nógv fyri at kalla teir favorittar á nakran hátt.

- Ein nýggjur dystur, og ein nýggj støða. Toftamenn eru sterkir, og vit skulu upp í ferð fyri at gera tað gott, segði Heðin Askham at enda.

## Páll hyggur frameftir

Ein av frægu HB-arunum í gjár var hart arbeiðandi áleyparin, Páll Mohr Joensen. Hann tekur soleiðis saman um:

- Eg haldi tað er í lagi, at teir vinna í dag. Grundað á tað, at vit ikki eru góðir nokk. Vit skapa ikki nógvar málmøguleikar. Vit hava møguleikan at skora til 2-1, men ikki nógv meir enn tað, segði Páll eftir dystin. Hann legði afturat, at brotssparkið sá út til at vera heldur bíligt, men viðgekk samstundis, at Petur Reinert helst skuldi havt betri greiðu á hasum tingunum, enn hann sjálvur.

HB er ikki beinleiðis tiltikið fyri at geva venjarunum langa lívlinju, men Páll metir ikki, at Rúni Nolsøe skuldi fingið sekkin.

- Eg haldi ikki, at loysnin er bara at koyra venjaran. Vit mugu bara spæla tað, sum vit hava at spæla fyri. FM er órealistiskt júst nú, men vit hava nógvar ungar leikarar at spæla inn á liðið. Tað vildi verið gott at bygt upp á næst ár, heldur Páll Mohr Joensen.